# Risatap í Nykredit

Nykredit fekk ein ordiligan undir vangan í fjør, tá samtakið fekk eitt undirskot upp á 880 milliðonir krónur áðrenn skatt. Í 2007 var úrslitið á botnlinjuni 4,4 milliardir krónur í yvirskoti. Nykredit sigur orsøkina til vánaliga úrslitið vera fíggjarkreppuna og bert hana. Hetta kemur fram við 1,4 milliardum, sum eru mistar við Roskilde Bank og Ebh Bank. Samstundis missir samtakið 358 milliónir krónur í sambandi við samanleggingina við Forstædernes Bank, umframt eitt kurstap upp á 2,6 milliardir krónur móti einum yvirskoti í 2007 upp á 2150 milliónir krónur.Samtaksstjóri í Nykredit, Peter Engberg Jensen, vísir í einari viðmerking til roknskapin á, at 2008 var merkt av einum framhaldandi vøkstri í kundavendu tænastunum, sum øktust 11%. Og at sjálvt við versnaðari konjunkturstøðu vóru tap og niðurskrivingar í kjarnuhandlunum avmarkað. – Men altjóða fíggjarkreppan setti síni týðiligu spor á úrslitið hjá samtakinum við niðurskrivingum í mun til Roskilde Bank og Ebh við negativum vinningi. Hóast eitt ikki nøktandi úrslit eru vit við einum sunnum grundhandli og sterkari kapitalbasu væl fyri til komandi ár, slær Peter Engberg Jensen fast, skrivar boersen.dk.





*Leygarmorgunin vóru líkindini betri, men enn er tvassut í sjónum. Fríggjakvøldið og leygarnáttin vóru ring hjá teimum seks monnunum umborð*

## Krøv herðast

Stjórin á Skipaeftirlitinum vísir á, at krøv, ið sett verða skipaflotanum, sum liggur undir eftirlitinum, ongantíð eru tengd at upp-ella niðurgongd í vinnuni.

- Skipini eru undir regluligum eftirliti og klassaviðurskiftum, og gongdin er, at krøv um eitt nú trygd á sjónum heldur herðast enn gerast lakari.

Vilhjálmur Gregoriussen leggur dent á, at krøv, sum Skipaeftirlitið ella Norsk Veritas seta, skulu haldast.

- Sýn og annað skulu haldast, og hesi viðurskifti verða á ongan hátt ávirkað av gongdini í skipavinnuni annars. Tað eigur ikki at síggjast aftur í versnandi trygd, um skiparaksturin gongur betri ella verri, sigur hann.

Stjórin á Skipaeftirlitinum ásannar, at truplar støður eisini kunnu uppstanda umborð á okkara bestu og nýggjastu skipum og eitt nú hendingin, har Falkur og Heykur stoyttu saman, er eitt dømi um hetta.

- Ofta er tað troyttleiki og menniskjanslig mistøk, sum eru atvoldin til hendingar. Summar hendingar verða kannaðar nærri av Skipaeftirlitinum, meðan onnur mál, har skip ella bátar eitt nú sigla á land, eisini kunnu gerast løgreglumál.

Vilhjálmur Gregoriussen sigur, at tað eisini er ein spurningur um fíggjarliga orku hjá stovninum, hvussu nógv kanningarvirksemi Skipaeftirlitið er ført fyri at hava.

- Vit meta um hendingarnar í hvørjum einstøkum føri, leggur hann aftrat.



*Nú eru líkindi at sigla ímillum við pumpum, men áðrenn sleipingin byrjar leygarmorgunin, verður sjógvurin pumpaður úr Grími Kamban*